# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
Mánadagin 1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúðleyp**
Mánadagin 1. feb. hava Guðrun og Poul Øregaard, Kollafjørð, gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Danmark saman við børnunum.

**Gullbrúðleyp**
Hósdagin 4 feb. hava Oda og Árni Frederiksberg, á Strondum, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fíggjakvøldið 19. feb. frá kl. 18 í Kelduni í Skálafirði.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. feb. giftast Niza Pardillo, av Filipsoyggjunum og Hans Hilmar Johannesen av Toftum. Vækomst verður á Svangaskarði kl. 19. Tey, ið ynskja, at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um, at siga frá á tlf. 748134/448134 innan 2. feb.

**Prógv**
Malan Magnusardøttir Gøthe, Norðragøtu, hevur tann 6. nov. 2009 lokið prógv sum Cand.jur. á Københavns Universitet.

**Prógv**
Marita Thomsen úr Hoyvík hevur lokið masterprógv sum ráðstevnutulkur, master of Conference Interpreting with Distinction, frá University of Westminster í London. Marita starvast nú í ES-tinginum, har tulkar úr sponskum, fronskum og donskum til enskt.

**Prógv**
Guðrið Vinther Hansen, Tórshavn hevur tann 22. jan. lokið prógv, sum professionsbachelor námsfrøðingur á University College Nordjylland.

# Elinborg Samson 60 ár



Týsdagin 2. februar, á kyndilsmessu, verður Elinborg Samson í Klaksvík 60 ár. Hon hevur í mong ár havt frisørstovu í Gerðum í Klaksvík.

Elinborg er ættað úr Gerðum. Pápin var Jógvan Martin Joensen, bóndi í Niðristovu, og mamman var Anna, fødd Hansen og ættað úr Nornastovu í Mikladali. Anna og Jógvan Martin fingu trý børn, sum øll búgva í Klaksvík: Andras (1945), Elinborg (1950) og Hjørdis (1955).

Beinanvegin eftir at Elinborg sum 15 ára gomul hevði biðið skúlanum farvæl, fór hon í læru, og síðani 1965 hevur frisørarbeiðið fylt nógv hjá henni og hennara. Elinborg lærdi hjá Bertu Larsen úti á Fornagørðum. Berta hevði fleiri lærlingar og fór seinni at arbeiða saman við dóttrina Sólrun.

Tá ið lærutíðin var lokin, fór Elinborg sum 20 ára gomul undir egið virkið. Tað hevur hon við stórum ídni og nærlagni røkt inntil fyri fáum mánaðum síðani. Tað vil siga í næstan 40 ár.

Tey fyrstu árini var salongin í kjallaranum hjá fastrini Ellu og Ámundi Poulsen í Gerðum. Í 1977 varð flutt oman um vegin í nýggja salong, og har hava Elinborg og starvslið hennara síðani hildið til. Hon hevur útbúgvið sjey lærlingar – úr Klaksvík og úr Eysturoy - og onkrir teirra hava í styttri og longri tíðarskeið, eftir at lærutíðin var lokin, arbeitt hjá Elinborg.

Tað hevur verið og er nógv lív í frisørstovuni í Gerðum. Eyðkent hevur verið, at kundarnir kenna seg væl, og tænastustøðið er høgt.

Í november 2009 gavst Elinborg sum meistari. Hon leigar frisørstovuna út, men hon heldur fram at arbeiða sum sveinur. Annika Poulsen, sum var lærlingur, er nú meistari.

Elinborg giftist í 1974 við Ólavi Samson, sum er ættaður av Stongunum. Elinborg og Ólavur eiga hugnaligt heim á Biskupsstøð, har tey búgva saman við synunum. Teir eru Jákup føddur í 1981, Jógvan føddur í 1983 og Ari føddur í 1989. Elinborg er omma at Tóka, sum Jógvan eigur saman við Vivian Bjartalíð.

Í frítíðini hevur Elinborg dámað væl at fingist við handarbeiði, eitt nú tøving. Hon hevur sungið í kóri í Emmaus og Klaksvíkar Sangfelag. Fyri fýra árum síðani bygdu Elinborg og Ólavur sær summarhús í Mikladali, og har dámar teimum og synunum væl at vera.

Føðingardagin verður morgunkaffi heima við hús.

J

## Prógv



Marita Thomsen úr Hoyvík hevur lokið masterprógv sum ráðstevnutulkur, master of Conference Interpreting with Distinction, frá University of Westminster í London. Marita starvast nú í ES-tinginum, har tulkar úr sponskum, fronskum og donskum til enskt.

## Dagurin

**1. februar. Brigida**, deyð ár 523. Henda franska halgikvinna stovnaði kleystur í Kildare, og er í Írlandi líka høgt í metum sum sjálvur Pátrikur, sum var ápostul Írlands. Sama navnið sum tey føroysku Birita og Brita. Upprunaliga keltiskt navn, sum merkir hin høga ella ljómandi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Maria í Ullvøruhúsinum 60 ár



Týsdagin 2. februar, á kyndilsmessu, verður Maria Andreassen Hentze í Havn 60 ár. Maria í Ullvøruhúsinum, sum hon altíð hevur verið nevnd, er sjúkrarøktarfrøðingur, og nógv komast við hana fyri hennara yndisliga sang og guitarspæl.

Maria er havnarfólk. Pápin var Leivur Andreasen ella Leivur í Ullvøruhúsinum, og mamman er Kirstin fødd Guttesen og ættað av Tinghúsvegnum. Kirstin og Leivur fingu tvey børn – Mariu (1950) og Jens (1953).

Maria vaks upp í Ullvøruhúsinum, har nógv fólk kom á gátt, og har gestablíðnið var stórt. Pápin hevði verkstað, og so var handilin í Ullvøruhúsinum undir somu lon.

Eftir barnaskúlan í kommunuskúlanum fór Maria í Hoydalar, har hon leyk realprógv, og áðrenn hon fór at læra til sjúkrasystir, var hon á bíbliuskúlanum Capernwray í Onglandi og á húsarhaldsskúla í Århus.

Í 1973 leyk Maria prógv sum sjúkraróktarfrøðingur á Sjúkrarøktafrøðisskúla Føroya. Hon hevur starvast á føðideildini og á psykiatriska deplinum, har hon framvegis er í starvi. Í nøkur ár búði Maria í Kanada, har hon fekk kanadiska autorisatión og arbeiddi sum sjúkrasystir. Ikki minst í starvinum sum sjúkrasystir hevur hennara fyrikomandi og blíða lyndi verið kærkomið.

Maria eigur fýra børn: Lena (26.09.1974), Leif (01.01.1976), Lars (08.11.1984) og Lisa (22.09.1989). Lena er gift Niclasi Johannesen úr Saltangará, og Leif er giftur Bjørg Mohr úr Fuglafirði. Øll børnini búgva í Havn uttan Leif, sum býr í Fuglafirði. Maria eigur eitt ommubarn, Kate Anderssen, í Fuglafirði.

Alla sína tíð hevur Maria nýtt sína fínu songrødd – í barnakórinum hjá Hans J. Højgaard í Kommunuskúlanum, í kórum í Ebenezer og sum solosangari. Fyrst í sjeyti árunum gav hon í Kanada út LP plátu, Maria, við enskum og onkrum føroyskum sangi á, og í 2004 kom fløgan út, sum síðani hevur verið heilt nógv at hoyra. Maria syngur solo, og hon syngur saman við báðum døtrunum, mammu síni, beiggja sínum og á onkrum sangi eru sangarar úr Dupultkvartettini í Ebenezer at hoyra.

Í 2006 giftist Maria við Páll Hentze heiman av Sandi. Páll er maskinmeistari og siglir úti. Tey búgva í vesturbýnum, og nú Maria fer um tey seksti, eru tey í heitari londum.

J